# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## 22 námsfrøðingar fingið prógv

**Fríggjadagin 5. februar var hátíðarhald í høllini á Læraraskúlanum í sambandi við at 22 næmingar fingu prógv sum námsfrøðingar**



***Aftara rað f.v.:*** *Joan Johannesen, Tórshavn, Laila í Løðu, Miðvágur, Bjørg Grunnveit Lützen, Svínáir, Sunrid Mikkelsen, Strendur, Wenzel Olsen, Saltangará, Ragna B. Patawary, Klaksvík, Anna í Garði Patursson, Kirkjubøur, Eilen Æðustein Poulsen, Tórshavn, Hertha Ravnsfjall, Tórshavn, Sóley Samuelsen, Tórshavn, Elin Kathrina Thomsen, Argir, og Tina Tórarenni, Skúvoy.*
***Fremra rað f.v.:*** *Jenny Áarskarð, Tórshavn, Marjun á Høvdanum Andreasen, Viðareiði, Brynhild Bláhamar, Tórshavn, Dania Paula Danielsen, Tórshavn, Rúni Eysturlíð, Tórshavn, Johnleif Gerðisá, Nes, Birita I. Heinesen, Norðragøta, Sólvá Høj, Strendur, Bjørt Joensen Dahl, Norðskála, og Arnfríða Johannesdóttir, Argir*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hjørdis Mellem-gaard, ættað úr Miðvági, búsitandi í Høje Taastrup**, andaðis á Herlev Sjúkrahúsi hósdagin, 71 ára gomul. Kórseting og jarðarferð verða kunngjørd seinni.

### Dagurin

8. februar. Korinta, deyð umleið ár 250. Kristin kona í Aleksandriu, sum ikki vildi ofra til heidnar gudar og tí varð tikin av døgum.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Erika Jacobsen**
úr Haraldssundi

andaðist á Norðoya Røktarheimi sunnudagin 7. februar, 85 ára gomul.

*Fyri tey avvarðandi*
**Símin**
**Oddvør, Jógvan Pauli, Jákup og Andrass**

Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans, kunnu ístaðin lata eina pen-ingagávu til Kunoya kirkju, konta í Norðoya Sparikassa.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri bróðir, mammu- og pápabeiggi

**Steingrím Nattestad**
Miðvágur

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum vóru um hann seinastu tíðina. Tøkk til Dávid Johannesen, prest, fyri prædiku og hjálpsemi. Tøkk til tykkum, sum hjálpti til við jarðarferðini og tøkk til tykkum, sum mintust og fylgdu Steingrími til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ivan, Otto, Karina og Tóri**

## Merkisdagar

**50 ára føðingardagur**
18. feb. verður Símun Poulsen, Bøgøta 15, Klaksvík, 50 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 20. feb í Skálanum frá kl. 17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Tey í vilja gleða Símun við at koma í føðingardag, kunnu siga frá á tlf. 221265 ella 220109 innan 14. feb.

**90 ára føðingardagur**
Leygardagin 13. feb. fyllir Eivind Gudmundsen, Sandavágur, 90 ár. Dagurin verður hildin í SÍF-húsinum frá kl. 16 til 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Hósdagin 4. feb. hava Oda og Árni Frederiksberg, á Strondum, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fíggjakvøldið 19. feb. frá kl. 18 í Kelduni í Skálafirði.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 12. feb. hava Hanna og Eirik Justinussen, Leirvík, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Dalavegi 40, Tórshavn, millum kl. 14 og 18.


Lesið Sosialin so eru tit við